DAGSINS MEINING

Ein av okkara størstu

Hóast tað eru eini hálvthundrað ar síðani skaldsøgurnar komu út, eru tær framvegis millum størstu varðarnar í bókmentasøgu okkara. Øll, sum hava áhuga fyri bókmentum ella skaldskapi, hava lisið Fiskimenn og Útrák. Hetta má vera prógv um, at Martin Joensen er ein av okkara bestu og fremstu rithøvundum.

Hevði bókmentaumhvørvið hjá rithøvundanum verið betri og høvdu vit havt betri ella fleiri bókmentametarar, tá Martin livdi og skrivaði, hevði Martin óivað havt skrivað meiri, og óivað hevði Marin óivað fingið eitt annað úrslit úr skrivingarhuga sínum og skrivingargávunum, enn hann fekk. Nakað soleiðis skrivaði Kristian Matras, tá Martin var farin í 1966, bara 64 ára gamal.

Bæði í skaldsøgunum og í teimum mongu stuttsøgunum lýsir Martin Joensen gerandisdagin hjá fólkinum, sum her býr, um stríðið á sjógvi og á landi, samveruna millum fólk, ja tað sosiala lívið. Hann er eitt sosialreaistiskt søguskald, men hann er ikki bara heimbýlisskald og samfelagslýsari. Hann lýsir harafturat lyndi og sálina í fólki.

Eins og hitt stóra rosaskaldið, Heðin Brú, skrivaði Martin Joensen nógvar stuttsøgur. Ta fyrstu søguna, Ein bygdarmynd, skrivaði hann í Føroya Sosialdemokarti í 1934 eftir áheitan frá P.M. Dam, sum tá var blaðstjóri á Sosialinum. Síðani síggja vit søgur í Føroya Sosialdemokrati, Varðanum, barnabløðum og í jólabløðum. Seinri komu tær í stuttsøgusøvnum, og Bókagarði at takka, hava vit llan skaldskapin hjá Martin Joensen í eini bókarað.

Martin Joensen var javnaðarmaður, og tann sosiala demokratiska hugsjónin, og hansara humanistiska lívsjón, sæst aftur í skaldskapinum. Eisini tók hann eitt stórt tak fyri Javnaðarflokkin og var eitt skifti blaðstjóri á Føroya Sosialdemokrati fyri hálvthundrað árum síðani. At gloyma henda partin í lívsstarvi hansara, nú hann er 100 ár, er aftur eitt dømi um at umskriva søguna.

Sum hjá so mongum øðrum varð hann vaktur á á Háskúlanum og háskúlaveturin fekk stóran týdning fyri lívleiðina. Hann fór á læraraskúla og var lærari, fyrst á økrum og Lopra, síðani í Sandvík og at enda á Tvøroyri, áðrenn hann legði frá sær.

Ídag eru 100 ár síðani Martin Joensen varð borin í heim. Í kvøld heiðra sandvíkingar bygdasonin, sum vendi aftur til bygdina sum lærari, og sum gjørdist ein av okkara "bestu pennum". Minnisvarðin verður fluttur til sjónligari stað, kvøldseta verður og fólk fara upp á gólv fyri at minnast henda stóra rithøvundan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Borgarstjórin á Eiði hevur heitt á SvF

Tordur J. Niclasen
borgarstjóri

Heidi Andresan av Eiði, saman við fýra øðrum í hennara bólki, er innstillað til at verða kosin heimsins besta ítróttarfólk. Vit bíða í spenningi og vóna, at SVF er uppgávu sína vaksið og letur okkum her á Eiði og allar føroyingar fáa lut í hesi spennadi løtu, sum verður í Monaco 14. mei í ár.

Heidi Andreasen, svimjari av Eiði, gjørdist heimskend, tá hon í Stokholmi 2. august 2001 umframt europeiskt met eisini setti heimsmet í 200 metrum blandari svimjing. Eiðisgentan fekk hendan dagin handað ikki færri enn 4 gull og 1 bronsumerki!

Heimbygdin tók hetta til sín sum eina stórhending og heimkomin úr Stokholmi varð hetjan heirað, tá eini 300-400 fólk um kvøldi 6. august komu saman á Vaglinum á Eiði.

Somuleiðis var hetta ein heiður fyri alt Føroya land og sum fólkið fegnaðist um.

Hitt almenna Sjónvarp Føroya gjørdi tó einki burtur úr hesi stórhending og loyvdi eg mær tá alment at seta Sjónvarpinum spurningin: "Hvar var SvF?"

Í heimsklassa.
Nú er so Heidi Andreasen , saman við fýra øðrum instillað til "Laureus Word Sport Award", har hon 14. mei verður stødd í Monaco og hevur møguleikan fyri at verða kosin til heimsins besta ítróttarfólk í sínum bólki.

Bara tað at verða vald út og soleiðis verða roknað millum heimsins bestu ,er stór hending í sær sjálvari. Spennandi løta verður tað av sonnum, tá avgerðin í Monaco verður tikin týsdagin 14. mei.

Gevið fólkinum lut í hesi løtu.
Hesa løtuna eiga føroyingar - og ikki minst fólkið á Eiði at fáa lut í. Hesin møguleikin og ábyrgd liggur hjá Sjónvarpi Føroya.

Áheitanin til SVF er tí, um ikki at endurtaka mistakið frá august í fjør, men at øll orku verður sett inn, soleiðis at løtan í Monaco, har Føroyar eru umboðar í heimsklassa, kann koma út í hvørja stovu í landinum - Heidi Andreasen til heiðurs og fólkinum til gleði.

Aftursvar til Jan Danielsen, bygdaráðslim í Nes kommunu

Súni í Hjøllum
form. í Teknisku Nevnd í Nes kommunu

Til tínar viðmerkingar í Sosialinum 5. apríl og Dimmalætting 6. apríl er stutt og greitt at siga, at tær eru sera villeiðandi og ósannar.

Fólk kunnu síggja hetta við at lesa *alla* fundarfrásøgnina frá bygdaráðsfundinum 11. mars, har týðuliga kemur til sjóndar, at við tilmælinum frá einari samdari teknisku nevnd, hevði Nes kommuna fingið munandi fleiri krónur til íløgur í 2002 - bæði til havnalagið og til eldrasambýlið.

Annars skalt tú hava stóra takk fyri reklamuna!

Eivind Jacobsen og privat viðurskifti

Niels Pauli Danielsen
Klaksvík

Tá ið valstríðið byrjaði, heitti varaløgmaður á allar flokkar og valevni um at føra seg virðiliga fram í politiska kjakinum og vera sakligir.

Løgmaður hevði sama boðskap, tá ið hann útskrivaði løgtingsvalið, og Jóannes Eidesgaard sigur seg í Sosialinum hin 16. apríl ikki kunna vera annan enn samdan við hesum, samstundis sum hann harmast Javnaðarfloksins vegna um skeivleika, sum er komin fram í onkrari valgrein hjá onkrum av valevnum teirra.

Hetta er hugburður, sum vit øll eiga at fegnast um, og ivast undirritaði einki í, at allir flokkar fegnir vilja, at valevni teirra halda seg burtur frá ósakligum og persónligum álopum, ið ongum gagna.

Í Dimmalætting hin 14. mars 2002 skrivar Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður á Strondum, sum er eitt av teimum nógvu valevnunum til løgtingsvalið um nakrar dagar, og sigur hann seg minnast, at undirritaði "av tingsins røðarapalli úttalaði seg um privatu viðurskiftini hjá ávísum persóni". Undirritaði veit seg ikki av tingsins røðarapalli at hava úttalað seg um privat viðurskifti hjá nøkrum persóni, og Eivind Jacobsen kundi verið kunnaður um, at tað vil tann til eina og hvørja tíð sitandi løgtingsformaður ikki á nakran hátt geva loyvi til.

Eivind Jacobsen sigur undirritaða "yvirtulka orðið privat". Tað sigur mær so mikið sum, at Eivind Jacobsen veit ikki nóg mikið um, hvat ið orðið privat merkir, og tað átti ein persónur at verðið kunnaður um, sum er uppstillaður til løgtingið.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VALGREINAR

Kortanei til at blanda religión og politikk saman

Álvur Kirke
valevni Miðfloksins í Suðurstreymi

Eg hoyri ofta fólk siga, at Miðflokkurin blandar religión og politikk saman.

Hetta er bara ikki so! Miðflokkurin vil einki hava við religión at gera!

Religiónin hevur gjørt nógv ilt gjøgnum tíðirnar.

Tað var jødiska religiónin, sum krossfesti Jesus!

Tað var kristna religiónin, sum drap milliónir av sonnum kristnum í miðøldini!

Tað er islamska religiónin, sum dagliga kostar mong mannalív í Ísrael!

Tað er kristna religiónin, sum enn í dag stríðist ímóti sonnum kristindómi!

Tá sagt verður, at religiónin drepur, so er hetta ein staðfesting av tí, sum Bíblian lærir.

Hvat er ein sannur kristin?
Religiónin drap Jesus! Jesus gav lív sítt fyri figgindar sínar!

Ein sannur kristin er lærisveinur Jesusar.

Ein sannur lærisveinur, ger sum mistari sín, og gevur lív sítt fyri figgindar sínar.

At geva lív sítt nýtist ikki at vera tað sama sum at doyggja likamliga.

Tað kann eisini vera at offra seg fyri eina søk.

Og tað er hetta, sum ein sannur kristin ger.

Ein sannur kristin vil gjarna offra nakað, fyri at hjálpa tær!

Ymsar uppfatanir av Bíbliuni
Tað eru nógvar ymsar uppfatanir av Bíbliuni, - men Miðflokkurin er ein politiskur flokkur, og ikki ein kirkja ella ein samkoma!

Miðflokkurin byggir á kristnu siðalæruna, kristna lívið, og ikki á religión!

Tey, sum samlast í Miðflokkinum, eru livandi kristin, - og tað er lívið í Kristusi, sum bindur okkum saman.

Miðflokkurin og religión
Miðflokkurin blandar ikki religión og politikk saman.

Religión hevur einki pláss í Miðflokkinum!

Eg eri púra samdur við teimum, sum siga, at vandi er fyri, at tað fer at enda við hyklarí, tá religión og politikkur verða blandað saman.

Religiónin bindur menniskju niður, og drepur, - men sannur kristindómur gevur frælsi og lív.

Vilt tú hava eitt livandi, frælst samfelag, so eigur tú at velja Miðflokkin, lista H.

Alt er gott á trøðni

Heðin D. Poulsen
Valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy

Bæði matrikullógin og lóg um landsjørð áseta, at jarðarbrúkini skulu leggjast saman. Seinastu álitini um landsjørð mæla til ta sama. Hetta kann tykjast hjá mongum, sum ein veruleikafjarður dreymur um eina farna tíð. Á tingi fari eg at arbeiða fyri tí,ið Óðalsfelagið hevur staðið fyri, millum annað fríari sølu av jørð í hóskandi eindum.

Vit skulu leggja inn fleiri traðir og skipa fleiri felagshagapartar nærhendis Havnini - sjálvsagt í samráð við bøndur,ið fyri endurgjald vilja lata seyðin frá sær.

Tað er nógmikið til av jørð, sum landið eigur, til at øll áhugaði í Suðurstreymi kunnu fáa jørð at røkja. Vit hava nú kjansin at virka fyri meiri óðalsjørð, fleiri traðum, smærri brúkum og betri trivnaði.

Smáu brúkini, serliga nærhendis Havnini, tryggja trivna og mentan.

Børn og ung eru framtíðin

Mikkjal Sørensen
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Oljan er góð, um hon kemur. Men oljan er ikki framtíð Føroya.

Børnini og tey ungu eru besta tilfeingið, vit eiga. Tí metir Javnaðarflokkurin, at vit mugu hava eitt gott skúlaverk. So fáment vit eru, kanska enntá betri, enn londini kring okkum.

Vitanarsamfelgið viðførir støðugar broytingar, ið krevur eitt skúlaverk við fjøltáttaðum arbeiðshættum og lívslangari læring. Dygdin í okkara skúlaverki skal í minsta lagi vera á hædd við londini kring okkum, um ikki hægri.

Tosað verður í dag um ein fólkaskúla í kreppu. Hetta kann ikki góðtakast og er ein trupulleiki, ið skal takast í álvara. Ein kann ikki bara stoyta í, uttan at víðka karmarnar, tí so flýtur yvir. Í dag verður nógv lagt á fólkaskúlan, uttan at játtanir fylgja við. Hetta er ikki gongd leið.

Javnaðarflokkurin vil tryggja fólkaskúlanum bestu umstøður at virka undir, so skúlin ikki bert fær framt tað, honum er álagt, men støðugt mennist. Her krevst ein játtan, ið hevur rúm fyri, at lærarar og onnur starvsfólk fáa dagført sína útbúgving.

Tímabýtið og játtanin til skúlarnar skulu vera rættvísari, so umstøðurnar kring landið gerast javnari.

Javnaðarflokkurin góðtekur ikki, at næmingar við serligum tørvi framhaldandi detta burturímillum. Hesir skulu hava eitt veruligt, virðiligt og dygdargott skúlatilboð.

Øll ung skulu hava tilboð um eina miðnámsútbúgving so nær økinum, tey búgva í, sum gjørligt. Miðast skal eftir, at so stórur partur av teim ungu, sum gjørligt, fær eina miðnámsútbúgving. Miðnámsskúlin skal vera náttúrligur partur av lokalsamfelagnum og útbúgvingarumstøður hjá ungum á miðnámsskúlum, hægri skúlum og Fróðskaparsetrinum skulu skipast, so góðir karmar eru fyri læring, har KT er náttúrligur partur.

Tí er at gleðast um at fyrsta stig er tikið, at byggja miðnámsskúla í Vági, og vil javnaðarflokkurin gjøgnumføra ætlanina.

Bústaðarmøguleikarnir hjá lesandi eru ikki nøktandi. Fortreytirnar fyri at byggja næmingaíbúðir skulu betrast.

Framtíðina tryggja vit, við at leggja lunnar undir eitt skúlaverk, har tey ungu fáa best hugsandi karmar at virka undir, tí børnini og tey ungu eru framtíðin.

Suðuroy í Fokus

Sverre Midjord
Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Fiskivinnan er grundarlagið undir landsbúskapinum og soleiðis eisini trygdarnetið hjá hvørjum einstøkum húsarhaldi.

Tað er av størsta týdningi, at henda vinna verður tryggjað bestu umstøður, ikki bara at virka undir, men eisini og tað er avgerandi, at útflutnings møguleikarnir eru teir bestu.

Tey, sum tilvirka okkara útflutningsvøru, skulu hava góðar umstøður at virka undir, og teir sum hava ábyrgd av virkjum, skulu hava teir bestu útflutningsmøguleikar, tað má og skal syrgjast fyri at okkara útflutningsvøra verður viðfarin uppá besta máta.

Tað vil siga, at vøran so skjótt sum gjørligt kemur á sølustaðið.

Nú hava vit í nógv ár flutt fiskin við Norrønu til Danmarkar, fyrst við Smyrli til Tórshavn og so víðari, men nú er vend komin í holuna, við tað at bæði Smyril og Norrøna hava broytt ferðaætlan, uttan at hugsa um Suðuroynna, sum hevur tann størsta útflutningin av fiski.

Hetta, at Norrøna heldur vil sigla við ferðafólki, er so teirra søk, og tað má fáa onkra klokku at ringja, at Smyril hevur broytt sína ferðaætlan tórsdag, so at hann fer av Tvøroyri kl. 17.

Tað vil siga, at her verða beinleiðis lagdar forðingar í vegin fyri útflutningin úr Suðuroy.

Tað tykist mær, at tað ikki órógvar teir ráðandi myndugleikar, at avstandurin verður øktur, og arbeiðsviðurskiftini verða gjørd verri.

Her má og skal vend koma í, tí útflutningurin úr Suðuroy letur í gjøldum milliónir til Tórshavnar Havn.

Hesi umrøddu viðurskifti eru ein landsuppgáva, sum má og skal loysast politiskt. Tað verður eitt krav, at útflutningurin úr Suðuroy skal flytast úr Suðuroy, og tað verður eitt krav, at fraktskipini koma á Tvøroyri eftir fiskinum. Vit fara at gera umstøðurnar hjá okkara fiskavirkjum betri, tí fiskivinnan bæði á sjógvi og landi er okkara tryggleiki.

Eg fari at virka fyri, at okkara útflutnings vøra verður avgreidd úr Suðuroy.

Framtíðin er tín

Ása Olsen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreym

Hesi seinastu fýra árini hava víst, at einasta gongda leið, at vinna størri sjálvstýri, er stig fyri stig politikkurin, ið Sjálvstýrisflokkurin stendur fyri.

At allir samgongu flokkarnir, við endan av hesum valskeiði broyttu kós, og hildu tað leið, vit hava stungið út í kortið, sigur ikki so lítið.

Tó er tað bert tín atkvøða, ið kann avgerða framtíð Føroya fólks.

Við Sjálvstýrisflokkinum í einari komandi samgongu, hevur tú trygd fyri, at tú sleppur at verða við til at avgera, við fólkaatkvøðu, framtíð Føroya.